## Fáa lítið fyri kópaskinn



Kanadiskir veiðimenn, sum hava roynt eftir kópi í Ný Funnalandi og fram við kanadisku eysturstrondini, hava fingið so lítið burturúr, at menn tosa um árið í ár sum eitt vanlukkuár. Í vár gav kanadiska stjórnin veiðimonnunum loyvi til at veiða 280.000 kópar, men síðani veiðitíðin byrjaði í vár, hava menn bara veitt eina fjórðing av kvotuni. Orsøkin er, at prísurin á kópaskinnum er fain í botn. Fyri trimum árum síðani kundu veiðimenninir fáa meiri enn 500 krónur fyri skinnið, men í dag kunnu teir ikki vænta at fáa meiri enn einar 70-80 krónur. Kanadiska stjórnin hevur lovað veiðimonnunum at gera eina roynd at fáa ES og onnur lond í Evropa at keypa kópaskinn, men mótstøðan hesumegin Atlantshavið er hørð.

## Nógvar óneyðugar skurðviðgerðir

Á donskum sjúkrahúsum verða nógvir sjúklingar lagdir undir skurð, hóast tað er fullkomiliga óneyðugt. Tað skrivar Berlingske Tidende í dag. Blaðið sigur frá fleiri læknum, at skurðviðgerðir eru vorðnar ein handilsvøra, soleiðis at sjúkrahúsini leggja fólk undir skurð fyri at fáa tey fíggjarligu viðurskiftini at hanga saman, so skurðdeildirnar fáa teirra part av fíggjarætlanunum. Læknarnir siga, at í nógvum førum er talan um óneyðugar skurðviðgerðir, sum kunnu hava óhepnar avleiðingar við sær. Birgitte Josefsen, sum er framsøgukvinna hjá Vinstra í heilsumálum, sigur við Berlingske Tidende, at læknarnir svíkja teirra ábyrgd, um teir seta fíggjarlig atlit fram um sjúklingarnar.

# Sól og samanhald í Streymnesi










SUMMARLÍV

*Lagt til rættis: Rógvi Nybo*
*Myndir: Jens Kristian Vang og Rógvi Nybo*

Børn og foreldur hugnaðu sær óført saman í Streymnesi fríggjadagin. Dagstovnurin við Kráir í Hvalvík og ungdómsdeildin hjá EB/Streymi skipaðu fyri stórum barnakarnivali, og bókstavliga øll børn og foreldur teirra vóru boðin.

Veðrið var sum bílagt til høvið, og sólin bakaði yvir ítróttarøkið við Margáir í Streymnesi, har stór sum smá saman kundu njóta góða veðrið og fáa eina góða upplivíng.

Sera nógv var gjørt burturúr til henda barnakarnivalin, og tað var ein sera fjølbroytt og intensiv skrá. Klokkan 15 byrjaði barnakarnivalurin við skrúðgongu av Dagstovninum við Kráir og til ítróttarøkið við Margáir. Frammi á vøllinum vóru fýra hoppiborgir, pylsuvognur við Pernille úr Eg Elski Føroyar, candyfloss og poppkorn, brandbilur, traktorar og gravimaskina, ið børnini kundu hugna sær við. Eisini komu nakrir leikarar av besta liðnum hjá EB/Streymi framvið og vóru klárir til ein stuttan dyst móti teimum, sum tordu at bjóða av. Á pallinum vóru fleiri ferðir framførslur, og vitjaðu Nósi, Bassar, Silvi og ikki minst Faroe5, ið rundaðu av við eini konsert fyri børnum og foreldrum.

Alt í alt var hetta eitt gott høvi hjá foreldrum og børnum at hugna sær saman og við øðrum, og kann sigast at hetta var eitt sera væl eydnað tiltak.





